gult10 cyan10 magenta10 svart10



## FISKIVINNUTÍÐINDI

# Gólvsølan

### 127 bátar landaðu knøpp 65 tons undan vikuskiftinum

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 18 | Sirið | lína | 178 |
| FD 79 | Havørnin | snella | 142 |
| FD 101 | Strandingur | lína | 174 |
| FD 102 | Bylgjan | lína | 544 |
| FD 123 | Riddarin | snella | 105 |
| FD 13 | Laksurin | snella | 128 |
| FD 176 | Helen | snella | 662 |
| FD 205 | Greta | lína | 638 |
| FD 222 | Gamli Edvard | lína | 1.684 |
| FD 250 | Halgerð | lína | 55 |
| FD 256 | Aðnasker | snella | 114 |
| FD 316 | Annfríð | snella | 216 |
| FD 322 | Klettur | snella | 183 |
| FD 329 | Karin 3 | lína | 344 |
| FD 33 | Krabbin | snella | 321 |
| FD 361 | Súlan | lína | 617 |
| FD 367 | Báran | snella | 178 |
| FD 377 | Julia | lína | 1.635 |
| FD 428 | Margit j | lína | 88 |
| FD 437 | Munkurin 3 | snella | 71 |
| FD 460 | Safir | lína | 808 |
| FD 492 | Klettur | lína | 124 |
| FD 512 | Nabbi | lína | 202 |
| FD 553 | Brandur | lína | 2.119 |
| FD 571 | Durita | lína | 1.315 |
| FD 591 | Maria | lína | 71 |
| FD 660 | Falkurin | lína | 207 |
| FD 855 | Lómur m/b | snella | 441 |
| FD 863 | Heidi | lína | 75 |
| FD 981 | Másin | snella | 81 |
| FD 984 | Tvey systkin | snella | 98 |
| FD1137 | Rivtangi | lína | 742 |
| FD1148 | Hellisberg | snella | 269 |
| KG 123 | Háenni | lína | 2.776 |
| KG 125 | Bjarnaberg | lína | 1.163 |
| KG 127 | Skurðaklettur | lína | 1.182 |
| KG 143 | Kallanes | snella | 284 |
| KG 23 | Nancy | lína | 483 |
| KG 288 | Heltnin | lína | 701 |
| KG 334 | Norðan | lína | 3.037 |
| KG 407 | Jøkul | lína | 1.104 |
| KG 423 | Jaspissteinur | snella | 449 |
| KG 430 | Báran | lína | 926 |
| KG 444 | Heiðabrúgv | snella | 204 |
| KG 45 | Randi | lína | 37 |
| KG 47 | Havsbrún | lína | 5.007 |
| KG 471 | Ørnin | lína | 36 |
| KG 507 | Søkin | lína | 2.089 |
| KG 512 | Neshamar | snella | 251 |
| KG 519 | Fyligsmoy | lína | 94 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| KG 543 | Halgafelli | lína | 1.277 |
| KG 587 | Reynsmúli | lína | 2.663 |
| KG 602 | Líðhamar | lína | 1.092 |
| KG 608 | Herdis | lína | 1.083 |
| KG 63 | Pollur | lína | 148 |
| KG 642 | Bragd | lína | 2.077 |
| KG 665 | Eysturroðin | snella | 273 |
| KG 666 | Sjóvarfossur | snella | 230 |
| KG 703 | Henny | lína | 928 |
| KG 705 | Sonja | snella | 247 |
| KG 706 | Skýlisklettur | snella | 1.016 |
| KG 708 | Vársól | lína | 378 |
| KG 74 | Nestangi | lína | 1.026 |
| KG 742 | Guðrun | lína | 45 |
| KG 79 | Nevið reyða | lína | 1.001 |
| KG 832 | Borgin | lína | 1.503 |
| TG 159 | Vesturbúgvin | snella | 198 |
| TG 26 | Majbritt | lína | 35 |
| TG 370 | Knávi | snella | 525 |
| TG 372 | Nósin | snella | 33 |
| TG 397 | Kvikk | snella | 288 |
| TG 40 | Kambur | snella | 195 |
| TG 401 | Barbara | snella | 287 |
| TG 41 | Vesturskin | snella | 164 |
| TG 471 | Núpur | kalvalína | 35 |
| TG 495 | Egil m | snella | 153 |
| TG 514 | Keldafossur | snella | 198 |
| TG 523 | Sóley | snella | 325 |
| TG 55 | Bláaberg | snella | 92 |
| TG 576 | Svanur | kalvalína | 120 |
| TG 592 | Jenny B | snella | 290 |
| TG 609 | Ráaklettur | snella | 220 |
| TG 620 | Bergur ii | snella | 245 |
| TG 622 | Varðin | snella | 392 |
| TG 628 | Alis T | lína | 365 |
| TG 631 | Skarstein | snella | 338 |
| TG 670 | Víkaberg | snella | 327 |
| TG 797 | Norðfarið | snella | 50 |
| TG 91 | Stjørnan | snella | 81 |
| TN 143 | Birita (696) | snella | 253 |
| TN 209 | Vaðanes | snella | 320 |
| TN 23 | Espingur | lína | 14 |
| TN 358 | Viðarnes | snella | 216 |
| TN 390 | Trý systkin | snella | 249 |
| TN 417 | Gunbjartur | snella | 190 |
| TN 561 | Safir 4 | snella | 573 |
| TN 723 | Brattaskorð | lína | 577 |
| TN 753 | Tóra | snella | 119 |
| TN 805 | Anna | snella | 139 |
| TN 892 | Nøvan | snella | 212 |
| TN 897 | Maj-n | snella | 202 |
| TN 919 | Morgunroðin | snella | 866 |
| TN1071 | Guðrið | snella | 277 |
| TN1090 | Annika | lína | 417 |
| VA 105 | Barið | snella | 29 |
| VA 109 | Ella | snella | 52 |
| VA 115 | Lómur | snella | 32 |

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| VA 132 | Lív | snella | 39 |
| VA 135 | Havfrúgvin | snella | 56 |
| VA 164 | Niklái | snella | 156 |
| VA 188 | Helena | snella | 46 |
| VA 190 | Sjóberið | snella | 53 |
| VA 192 | Havfrúgvin | snella | 69 |
| VA 215 | Akraborg | partrol | 2.071 |
| VA 251 | Elvira m/b | snella | 145 |
| VA 28 | Álitið | snella | 505 |
| VA 294 | Nestangi | snella | 140 |
| VA 300 | Cemary m/b | snella | 59 |
| VA 60 | Dáva Dánjal | kalvalína | 160 |
| VA 81 | Gutta Jógvan | snella | 258 |
| VA 82 | Raðnes | snella | 212 |
| VN 125 | Ægir | snella | 65 |
| VN 267 | Jenny m/b | snella | 182 |
| VN 301 | Nósin | snella | 260 |
| VN 309 | Atlanta | snella | 708 |
| VN 480 | Sæli | snella | 192 |
| VN 520 | Hvannadalur | snella | 43 |

| Vorunavn | kilo |
|---|---|
| Blálonga 0 | 8 |
| Brosma 0 | 63 |
| Brosma 3 | 1 |
| Brosma 3&4 | 259 |
| Hýsa 1 | 6.056 |
| Hýsa 2 | 7.129 |
| Hýsa 3 | 5.710 |
| Hýsa 4 | 2.355 |
| Havtaska 0 | 171 |
| Hvítingur 0 | 5.209 |
| Kalvi 1 | 210 |
| Kalvi 2 | 276 |
| Kalvi 4 | 27 |
| Longa 0 | 39 |
| Longa 2 | 54 |
| Longa 3 | 48 |
| Longa 4 | 10 |
| Longa 4&5 | 92 |
| Reyðsprøka 0 | 8 |
| Skøta | 24 |
| Skrubba | 8 |
| Steinbítur | 50 |
| Toskur 1 | 174 |
| Toskur 2 | 2.037 |
| Toskur 3 | 14.121 |
| Toskur 4 | 11.968 |
| Toskur 5 | 6.221 |
| Tunga 0 | 15 |
| Upsi 0 | 415 |
| Upsi 2 | 367 |
| Upsi 3 | 1.107 |
| Upsi 4 | 170 |
| Upsi 5 | 149 |

# ICES við døprum toskaútlitum

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum fekk í gjár tilmælini frá ICES yvir fiskiveiðuna fyri komandi ár. Hetta eru niðurstøðurnar eftir hálvárliga fundin, sum ICES helt herfyri.

Útlitini eru ikki góð. Tilmælini frá ICES verða almannakunngjørd í dag og tað eydnaðist okkum ikki at fáa nøkur tøl, áðrenn blaðið fór til prentingar. Men fiskimálaráðharrin er ikki bjartskygdur, tá tað snýr seg um tosk.

- Eg kann siga somikið, at mær hevði dámt betri at lisið eina góða skaldsøgu, enn seinastu frágreiðingina frá ICES, sigur Jørgen Niclasen.

Tilmælið frá ICES verður helst almannakunngjørt á tíðindafundi í dag.

# Heittu á hvønn annan um at skikka sær pent

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í seinastu viku luttók Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri saman við fiskimálaráðharrunum í strandalondunum kring norður Atlantshav og ES á einum fundi í Svøríki um hvussu vit ansa eftir, soleiðið at fiskiveiðuríkidømi í Norðuratlantshavi, Norðsjónum og Eystursjónum verður gagnnýtt á burðardyggan hátt.

- Eg haldi, at tað var ein góður fundur, har allir heittu á hvønn annan um at skikka sær pent, sigur Jørgen Niclasen.

- Eg eri sannførdur um, eftir at hava lurtað eftir hvørjar trupulleikar hini londinu á fundunum høvdu at dragast við, at hini londini hava størri trupulleikar at dragast við enn føroyingar. Eisini, at nógv av teimum trupulleikum, sum teir hava, hetta eru trupulleikar, sum vit longu hava loyst, sigur Jørgen Niclasen.

- Støðan í Norðsjónum og Eystursjónum er heilt út av lagi vánalig, serliga toskastovnurin og hjá kanadiarum varð toskastovnurin heilt burtur, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.

- Eg brúkti myndina við passinum á fundinum. Vit eru við í Schengen og tí er ikki neyðugt at vísa pass, tá tú ferðast eitt nú til Svøríkis úr Føroyum. Á sama hátt er við fiskinum, hann hevur verið í Schengen samstarvinum í túsundtals ár. Um grannalondini ikki eisini ansa eftir, so er grundarlagið burtur hjá eini tjóð sum Føroyum, ið bert livir av fiskivinnu, sigur hann.

Ein tílíkur fundur er næstan bara útmeldingar, um hesar útmeldingar verða framdar í verki, tað er ein annar spurningur.

### Stórur áhugi fyri fiskidøgum

Á fundinum var stórur áhugi fyri føroysku fiskidagaskipanini. Føroyar er einasta land í Norðuratlantshavi, sum hevur hesa skipan burturav. Jørgen sigur, at tað vóru eisini nógvir kritiskir spurningar um hesa skipan. Serliga hvussu vit forða fyri, at ov nógv veiða verður eftir einum fiskaslagið. Í hesum samnbandi greiddi fiskimálaráðharriin frá strongu friðingarreglunum undir Føroyum, sum amboðið, íð skal stýra, at ikki ov nógv verður roynt eftir tí eina fiskaslagnum.

gult11 cyan11 magenta11 svart11






Heini Olsen | Torbjørn Thomsen | John Arin Nilssen | John Rødgaard | Ólavur Simonsen | Eyðun Nolsøe

## Heimsins mætasti telvari til Føroya

Fremsti telvari í heiminum seinastu fimtan árini, Garri Kasparov, verður í Føroyum í døgunum 8.-12.juni í ár.

Talvsamband Føroya hevur boðið tí russisku talvbjørnini heim á klettarnar í summar.

Mest forvitnisliga tiltakið á Føroyavitjanini verður helst dysturin í Norðurlandahúsinum millum føroyska landsliðið og Kasparov. Tað verður skipað so, at heimsins besti telvari skal kappast móti seks teimum sterkastu føroysku telvarunum í senn.

Hetta verður simultantelving, Kasparov fer at ganga ímillum tey seks borðini og hevur tí einstakar dystir móti hvørjum av teimum seks føroysku landsliðstelvarunum. Ímóti munandi sterkari telvarum hevur Kasparov verið ruddiliga við yvirlutan. Kongurin vitjar Føroyar og eigur leik, spurningurin er, megna vit at at svara aftur? Fylg við í Norðurlandahúsinum, sunnudagin 10 juni kl. 16.00.

Atgongumerkir til landsdystin fáast til keyps í Norðurlandahúsinum.

SKRÁ

Fríggjadagur 8. juni

- kl. 16.00 Koma í Vága Flogvøll, prát við pressuna
- kl. 18.00 Útferð til Tórshavn við Silju og ferðaleiðara
- kvøld Móttøka hjá Tórshavnar Býráð í móttøkuhúsinum

Leygardagur 9. juni

- kl. 10.00 Fundur í Mentamálastýrinum. Torbjørn Jacobsen telvar móti Kasparov
- kl. 11.00 Fráferð úr Tórshavn til Klaksvíkar við Alpha Pilot um Leirvíksfjørð
- kl. 13.00 Morgunmatur á Klaksvíksvegi 12, í Klaksvík
- kl. 14.00 Simultan í Klaksvík, 25 borð, øll niðanfyri 1990 rating
- kl. 16.00 Útferð í Norðoyggum. Túrur í Klaksvík og til Viðareiðis við Alex Sólstein sum ferðaleiðara
- kl. 18.00 Døgurði í Klaksvík, Klaksvíkar Býráð er vertur
- kl. 21.00 Fráferð til Tórshavn við Alpha Pilot um Leirvíksfjørð

Sunnudagur 10. juni

- kl. 11.00 Tveir tímar saman við talvunglingum úr øllum Føroyum
- kl. 13.00 Morgunmatur á Hotel Føroyum
- kl. 16.00 Simultan landsdystur í Norðurlandahúsinum, 6 borð. Kasparov svarar spurningum eftir dystin
- kvøld Døgurði í Kirkjubø, mentamálaráðharrin er vertur

Mánadagur 11. juni

- kl. 11.00 Tíðindafundur í Føroya Sparikassa, Yviri við Strond
- kl. 12.00 Morgunmatur í Rio Bravo
- kl. 14.00 Útferð allan dagin
- kvøld Døgurði á Hotel Hafnia. Talvsamband Føroya er vertur

Týsdagur 12. juni

- kl. 11.15 Fráferð

Stephanssons Hús 31 42 91